# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Jákup Edvard Joensen í Klaksvík**, vanliga nevndur Jage á Ternuni, fer til gravar úr Betesda Kristi himmalsferðardag kl. 13. Farið verður úr kapellinum mikukvøldið klokkan 18. Tey, ið vilja minnast Jákup, kunnu lata eina peningagávu til Akurin, konta í peningastovnunum.

**Tórarin Bergí Oyndarfirði** andaðist á Ríkissjúrkshúsinum mánadagin, 65 ára gamal.

**Mary Vang Hansen**, ættað úr Havn, vanliga nevnd Merry, andaðist sunnudagin á Sýnini í Miðvági, 79 ára gomul.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá

**Arngrímur Thomassen**
Sandavági

andaðist og varð jarðaður.
Vit takka Emil Olsen, presti, fyri góð orð.
Somuleiðis takka vit kirkjutænarum, sangarum, gravarum og øllum teimum, ið hjálptu við ervinum.

*Familjunnar vegna*
**Albert og Sunneva**

**Dagurin**
**19. mai. Potentiana**. Rómversk genta, sum 16 ára gomul varð tikin av døgum í Róm. Robert Joensen doyði hendan dagin í 1997.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



*Jens Clausager frá Boghandlerforeningen handar Anniku Árting heiðursbrævið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Annika er besti ungi bókaseljarin

Almenn móttøka var í bókahandlinum Rit&Rák í SMS týsdagin í sambandi við at 29 ára gamla Annika P. Árting úr Havn er kosin sum besti ungi bókaseljarin í danska ríkinum.

Annika er júst liðug við útbúgving sína sum bókahandlari. Útbúgvingin tekur vanliga fýra ár, men tá Annika hevur FHS og HF prógv, var lærutíðin einans tvey ár.

Í grundgevingunum fyri at verða kosin "Årets Unge Boghandler" stendur m.a. um Anniku:

"Ársins besti ungi bókahandlari hevur verið fakliga væl fyrireikað undir útbúgvingini og víst stóran áhuga fyri fakinum, eins og hon er fyritakssom og góð at samstarva við"

Annika fær eisini eina ferð til Frankfurt, har 52. altjóða ráðstevnan fyri ungar bókahandlarar verður hildin í hesum mánaðinum. Tað var Jens Clausager frá Boghandlerforeningen í Keypmannahavn, sum handaði Anniku heiðursbrævið.

*mg*

# Heilsucafé í Runavík

Heilsucafé verður á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi leygardagin 23. mai kl. 14.

Heilsumálaráðið hevur lýst 2009 at verða alment rørsluár, og í hesum sambandi skipar Runavíkar kommuna fyri eini heilsucafé á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi leygardagin 23. mai 2009 kl. 14.

Tiltakið byrjar kl. 14 við at Sæunn Ólavsdóttir Hansen, varaborgarstjóri, bjóðar vælkomin.

Eftir tað greiðir Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, frá um Rørsluárið 2009.

Síðan hevur Tordur Niclasen, fyristøðumaður á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, ein fyrilestur um týdningin av rørslu hjá yngri og eldri.

FØROYAR Í RØRSLU

Heilsucafé verður kl. 15 og kl. 15.45 verður gongutúrur eftir nýggju gøtuni niðan Toftavatn.

Nes- og Runavíkar kommunur luttaka í verkætlanini við arbeiðnum at varðveita serstøku náttúruna við Toftavatn.

Ætlanin við tiltakinum er at fáa fólk meira tilvitað um týdningin av rørslu. Høsti verður at hoyra, hvussu vit fáa fólk at røra seg meira á arbeiðsplássinum, barnagørðum, skúlum, ellisheimum og í frítíðini annars. Vit vita, hvussu umráðandi tað er fyri likam og sál at røra seg. Ikki minst at fara út í okkara vøkru náttúru. Hetta er sinnisríkandi í øllum veðri.

Hugtakið "MARK", sum stendur fyri Motión, Alkohol, Royking og Kostur hevur ein greiðan boðskap. Tað snýr seg um, hvussu vit øll vanda okkum um heilsuna og sostatt fáa eitt betri lív.

Tað snýr seg um at røra seg. Rørsla skal verða ein náttúrligur partur av gerandisdegnum.

Fyrilestrarnir vera í Samkomuhøllini og Heilsucaféin í Matarsalinum.

*mg*

